VB-B36 0-3 (0-1):

# B36 streyk við øllum

**Vágbingar kendu seg snýttar, tá dómarin kolldømdi mál, og bara 30 sekund seinni hevði Alex dos Santos sent ein kandidat til heitið sum ársins mál**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Einki er at ivast í, hvat samrøðuevnið eftir dystin á Eiðinum millum VB og B36 var. Smáar tíggju minuttir fyri leiklok sendu vágbingar fríspark innfyri B36 málið. Bólturin varð stútaður í kassan, og vágbingar hildu, at nú var javnvág komin í roknskapin, sum annars vísti 0-1.

Men dómarin kolldømdi málið, og so gjørdu gestirnir skjótt av. Bólturin varð sendur fram á vøllin har brasilianski Santos dróg tvær ferðir, áðrenn hann úr 35 metrum smekkaði til, og hóast Bjarni í VB-málinum stóð har, sum hann skuldi standa, so megnaði hann ikki at forða framúr vakra skotinum í at fara í kassan.



*Talan var um eina uppgerð, sum í veruleikanum var nakað væl tættari, enn endaliga úrslitið vísti*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

hampuliga góð.

Hjá B36 man lagið hinvegin vera av tí besta. Sigrar í Vági eru ikki gerandiskostur hjá liðnum, og í øllum førum skal leitast heilt langt aftur, um ein somikið tryggur sigur skal finnast. Sigurin heldur eisini B36 ovast á talvuni. Komandi tríggjar vikurnar vera tó helst ein styrkisroynd í so máta, tá liðið hevur dystir móti bæði HB og Skála, sum í løtuni eru á næstu sessunum á talvuni.

### Varin byrjan

Hetta var helst hendingin, sum avgjørdi dystin, og eftir hetta fekk VB ikki skapt nakran spenning í aftur dystin. Heldur ikki hóast teir tveittu nógv fram seinastu tíðina.

Men fram til tá hevði talan verið um eina hampuliga javna uppgerð. Bæði VB og B36 hava í ár verið sterk í verjupartinum, og tað tóktist eisini skula eyðkenna dystin sunnudagin. Byrjað varð varliga frá báðum pørtum, og tað var sjáldan, at talan gjørdist um veruligar málmøguleikar.

B36 var tó liðið, sum hevði bóltin væl meira, og teir komu eisini fram til nakrar møguleikar, sum tó sjáldan gjørdust heilt vandamiklir. Tað gjørdist tað tó, tá Alex dos Santos ta einu ferðina smekkaði hart innlegg innfyri. Við handaru stong kundi Allan Mørkøre møta bóltinum, og so hevði veteranurin aftur gjørt mál fyri B36.

### Taktiskt spæl

Fyri tað mesta gjørdist talan síðani um eitt taktiskt spæl, har hvørgin parturin tordi ella vildi satsa ov nógv. B36 tók seg nakað aftur á vøllin – ikki minst eftir at Ingi Højsted varð noyddur av vøllinum – men tað var tó sjáldan, at talan gjørdist um veruligar vandastøður. Ta einu ferðina var tó um reppið, at Milan Kuljic fekk frítt skot, men í málteiginum eydnaðist Santos at blokera royndini.

Móti endanum kom VB tó nakrar ferðir nær nøkrum, sum líktist einum málkjansi, og so kom støðan, sum tosað verður um. Tann parturin endaði tó við, at B36 avgjørdi, og tó at VB tveitti nógv fram seinastu løtuna, so var hetta nyttuleyst.

Samstundis gjørdist vertirnir nakað tunnir í verjupartinum, og eftir at B36 hevði havt nakrar naskar kontra-royndir, kundi Bogi Hermansen staðfesta sigurin, tá hann hegnsliga avsluttaði eitt væl gjøgnumspælt álop.

Hjá VB tóktist ósigurin at vera ein staðfesting av, at liðið hevur trupulleikar við at standa seg á heimavølli. Hinvegin skal eisini takast atlit til, at talan var um truplan heimadyst, og at tað tí ikki heilt so væl ber til at draga nakrar niðurstøður úr hesum tapinum. Og spyrt tú ein vágbing í dag, so er hann helst ivaleysur í, at talan skuldi verið um javnleik. Og um tað hevði verið úrslitið, so hevði tosið í Vági helst verið eitt heilt annað í dag. Fyrst og fremst, so er málið hjá vágbingunum at byggja eitt nýtt lið upp í ár, og fyribils hevur úrtøkan av hesum arbeiðinum eisini verið

## FAKTA UM DYSTIN

**VB-B36 0-3 (0-1)**
0-1: Allan Mørkøre, 18.
0-2: Alex dos Santos, 79.
0-3: Bogi Hermansen, 89.
**VB:** Bjarni Johansen – Mortan úr Hørg, Anders Sørensen, Michael í Lágabø, Kári í Lágabø – Nenad Zivanovic (Eyðstein í Lágabø, 46.), Evrad Ble, Milan Kuljic, Símun Samuelsen – Poul N. Poulsen (Kenneth Kjærbo, 77.), Dan Djurhuus
**GK:** Milan Kuljic, 39., Evrad Ble, 42., Dan Djurhuus, 51., Poul N. Poulsen, 52., Anders Sørensen, 73.
**B36:** Jákup Mikkelsen – Pól Thorsteinsson, Herbert í Lon Jacobsen, Fróði Benjaminsen, Alex dos Santos – Bergur Midjord (Bárður H. Joensen, 85.), Ingi Højsted (Klæmint Matras, 31.), Mikkjal Thomassen, Eyðun Højgaard – Allan Mørkøre, Óbi (Bogi Hermansen, 77.)
**GK:** Pól Thorsteinsson, 44., Klæmint Matras, 66.
**Dómari:** Oddmar Andreasen

# Fantastiskt úrslit

- Hetta er í øllum førum besta úrslitið, sum eg havi verið við til at fáa í Vági.

Soleiðis staðfesti B36-miðvallarin, Mikkjal Thomassen, eftir at hann og liðfelagarnir høvdu togað ein 3-0 sigur við sær heim, og so er einki at siga til, at frøin í B36-leguni var stór.

- Vit eru í øllum førum væl nøgdir. Vit hava kanska ikki tað liðið, sum spælir mest poleraða fótbóltin í landinum, men vit spæla fyri at vinna. Og tað er væl ein dygd í sjálvum sær í so máta, at vit eru sterkir í verjupartinum. Av seks dystum hava vit fýra ferðir hildið málið reint, og tað gevur eisini nakað av sjálvsálitið, slær Mikkjal fast.

Um sjálvan dystin helt Mikkjal, at hann var bilsin um, hvussu gott pláss teir í B36 fingu í fyrra hálvleiki.

- Vit fingu loyvi til at hava bóltin øgiliga nógv, og sjálvt um vit ikki skaptu teir nógvu møguleikarnar, so gav hetta okkum frið at spæla. Seinni fella vit nakað aftur á vøllin, men tað er sjáldan, at teir gerast heilt vandamiklir. Spurningurin er so, hvørt hatta málið hjá teimum var off-side ella ikki, men Alex avgerð so alt við einum fantastiska flottum máli, staðfestir Mikkjal at enda.

**-jm**

# Harmast kolldømingina

Hóast talan í seinasta enda gjørdist um greitt tap hjá VB, so helt VB-venjarin, John Christensen, ikki, at talan hevði verið um nakað vánaligt avrik frá hansara monnum.

- Sjálvandi er 0-3 á heimavølli ikki nakað gott úrslit, men so skalt tú eisini hugsa um, hvat tað er, sum hendir. 10-11 minuttir fyri leiklok halda bæði eg og spælararnir, at vit hava javnað, men tað hildu dómararnir altso ikki. Og bara 20-30 sekund seinni liggur bólturin so í okkara máli. Tað sigur seg sjálvt, at tað tá gerst sera tungt, men eg haldi tó, at vit kortini vísa rætta viljan. Vit satsa í øllum førum alt seinastu løtuna, og um tað so verður 3-0, hevur ongan týdning í so máta.

- Men sum sagt, so verða vit punkteraðir av hasum 2-0 málinum, og eg eri í øllum førum spentur til 3-2 sendingina mánakvøldið, so eg kann síggja hasa kolldømingina umaftur, staðfestir venjarin.

Um dystin sjálvan og mótstøðuliðið helt VB-venjarin, at teir hóast alt eisini høvdu møtt einum betri liði.

- Eg má viðganga, at B36 var betri enn vit. Teir eru sera væl skipaðir í verjupartinum, og tað ger tað sera trupult at vinna á teimum. Fram eftir vøllinum skapa teir kanska ikki heilt so nógv, men við tolnum spæli megna teir at bíða, til møguleikin kemur, og tí haldi eg, at hetta er besta liðið, sum vit hava møtt higartil í kappingini.

**-jm**